## Fríðborg fingið sjógv

Eingin mansskaði hendi, tá rækjutrolarin Fríðborg fekk ein sjógv sunnan fyri Hvarvið í mikukvøldið.

Fríðborg var á veg vestur á Grand Bank, tá skipið fekk ein sjógv nakað sunnan fyri Hvarvið. Nakrir rútar á brúnni fóru inn, og ein partur av útgerðini á brúnni fór, men tað eydnaðist manningini at seta plátur uppfyri.

Tummas Justinussen, reiðari, sigur við Norðlýsið, at hann veit ikki við vissu, hvussu stóran skaða skipið hevur fingið, ella hvar skaðin skal umvælast. Hin rækjutrolarin hjá reiðaríinum, Havborg, er á veg til Fríðborg. Fríðborg er fyrrverandi Napoléon. 17 mans eru við skipinum.

## Ejendomsvækst stendur seg væl

Tað gongur væl hjá Ejendomsvækst A/S, sum Eik eigur ein part av. Børsen skrivar, at Ejendomsvækst er millum tey størstu á sínum øki í Danmark nú.

Ejendomsvækst hevur keypt fastogn í Týsklandi og Svøríki fyri 1,7 mia kr., og ársumsetningurin av fastogn verður umleið 3,5 mia kr. Hetta ber í sær, at Ejendomsvækst helst fer at standa sum størsti útbjóðari av sonevndum íløguognum í Danmark, skrivar Børsen.

Ejendomsvækst A/S er eitt felag, sum bjóðar íleggjarum á ymsan hátt at seta pening í fastogn í fleiri londum.

# Útnorður samstarv á konsertferð

**Komandi vikuskiftið 13. og 14. januar fer Arctic Yggdrasil á pall í Norðurlandahúsinum og á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á konsertunum hjá Yggdrasil í fjør í Grønlandi spældi Yggdrasil fyri fyrstu ferð við Rasmus Lyberth sum solisti.

Úrslitið av samstarvinum gjørdist somikið nøktandi, at Yggdrasil og Lyberth fara á pall aftur saman í januar. Fyrst á Norður Bryggjuni í Keypmannahavn 13. januar og síðan í Norðurlandahúsinum 14. januar. Saman kalla teir seg Arctic Yggdrasil & Rasmus Lyberth.

Teir fara at framføra suitina Grønland – Verden Åndehul / Nunarsuup Allua / Blástur heimsins, ið er nýskrivað av Kristian Blak og Rasmus Lyberth.

Kristian Blak og Rasmus Lyberth hava áður arbeitt saman á verkætlanini Piniartut – the Hunters (2001). Nýggja verkið tekur støði í Arktis, og hugleiðingum hjá Rasmus Lyberth um grønlendsku náttúruna og íshavið sum heimsins blástur.

Blak & Lyberth samstarvaðu lið um lið við at skapa tær 9 kompositiónirnar, sum virka sum eina ferð gjøgnum innlandsísin. Alt framført á grønlendskum av Lyberth.

Artic Yggdrasil eru Rasmus Lyberth (sang og slagverk), Kristian Blak (klaver), Angelika Nielsen (fiól), Villu Veski (saksofon) og Mikael Blak (bass)

**nud**






## Nýtt videobrot við Roger Hodgson á Summarfestivalinum

Nú er høvi til at síggja eitt videobrot við Roger Hodgson har hann framførur heimskenda lagið “Give A Little Bit”.

Tað vóru troyttir festivalgestir, sum hugaligir bíðaðu til langt út á náttina fyri at uppliva Roger Hodgson, sum ótroyttiliga hevði roynt at lent í Føroyum í yvir eitt døgn. Eftir fleiri uppfyllingar í Íslandi og Noregi eydnaðist umsíðir hjá Atlantic Airways at lenda í Vágum og fáa Superstjørnuna express norður til Klaksvíkar við tyrlu, og fagnaðurin var stórur, tá ið Mr. Supertramp, Roger Hodgson, trein á pallin.

Tað vóru ongin tekin um troyttleika og onki knarr frá aldrandi harranum, bert positivar vibratiónir og ein professionell superstjørna, sum í lýsingini trøllabant fólk við síni eyðkendu rødd, góðu løgum og sínum ljósa lyndi. Ein ógloymandi løta á Vágsbøi!

Videobrótið er at finna undir slóðini video á www.summarfestivalur.fo

**Fróði Steenberg**

# Kunoyar kommuna fingið átalu

Løgtingsins Umboðsmaður átalar Kunoyar kommunu fyri drúgva og jánkaliga viðgerð.

Ein kommuna kann ikki umbera seg við vantandi arbeiðsorku, og at hon tí ikki hevur stundir til at avgreiða eina umsókn um alment innlit. Tað sigur Løgtingsins Umboðsmaður, sum hevur átalað Kunoyar kommunu fyri drúgva og jánkaliga viðgerð, tá hon fekk eina umsókn um innlit í fýra mál.

Umsóknin var frá einum bygdaráðslimi, sum eisini bað um innlit sum borgari í kommununi. Umsøkjarin fekk ikki svar fyrr enn meiri enn tríggjar mánaðir seinni, sjálvt um lógin sigur,at umsøkjarar eiga at fáa at vita innan 10 dagar, hví teir ikki hava fingið svar, og nær svarið kann væntast.

Kunoyar kommuna umbar seg við millum annað vantandi arbeiðsorku, men ta frágreiðingína góðtekur Umboðsmaðurin ikki. Og kommunan kann heldur ikki umbera seg við, at umsóknin var ikki nóg greið, tí fyrisitingarlógin sigur, at ein kommuna eigur at hjálpa umsøkjarum, so kommunan greitt fær at vita, hvat tað er, sum umsøkjarin biður um.

**-árni**